# Tóku fyrstu fetini á



The Dreams hava við teirra lívliga og fangandi rocktónleiki lagt Danmark fyri sínar føtur. Nú kunnu teir fyri fyrstu ferð í langa tíð upplivast aftur á føroyskum palli

**The Dreams tóku síni fyrstu fet fyri opnum skíggja á MTV, síðani hava teir fingið gjøgnumbrot í Føroyum, og nú eru teir eisini víðagitnir í Danmark. Men teir ætla ikki at steðga har, og framleiðarin hjá teimum sær stórar møguleikar**

Punkbólkurin The Dreams hevur støðugt gjørt vart við seg, síðani bólkurin varð stovnaður í 2004. Fyrsta árið var helt tað mest friðarliga hjá teimum, men í september 2005 komu teir av álvara fram, tá ið teir vóru við í eini sjónvarpsrøð hjá MTV, sum kallaðist MTV A CUT.

Hetta var ein kapping millum ungar bólkar, og dómari í kappingini var millum annað kenda songkvinna Anastacia. The Dreams endaði á triðja plássi í hesi kappingini.

Tað stóra fólksliga gjøgnumbrotið í Føroyum fekk The Dreams, tá ið teir á sumri í 2006 spældu fløguna Tazi inn. Á útgávuni gjørdu teir sínar egnu tulkingar av kendum føroyskum poppsangum, og hetta var sera populert. Sangir sum Sasasasa, Nummar, Cirkus Tinganes og aðrir vóru nógv at hoyra, og Sasasasa mundi verða størsta útvarpshittið hetta árið.

## Til Danmarkar

Á heysti í 2006 fluttu tónleikararnir í The Dreams til Danmarkar at búgva, og har var ætlanin at leggja alla orku í at spæla tónleik.

Stutt eftir, at teir vóru komnir niður, royndu teir seg í donsku útgávuni av Global Battle of the Bands, og hóast eitt triðja pláss var heiðurligt, var stóri sigurin hjá teimum í kappingini, at teir hittu framleiðaran Chief 1, sum teir hava arbeitt saman við síðani.

Úrslitið av hesum samstarvi hava fólk nú sæð ein part av. The Dreams vóru við í danska Grand Prixnum og fingu veruligt gjøgnumbrot í Danmark. Teir hava givið nýggja fløgu út, og sangir hjá teimum hava verið ovast á Boogie listanum.

Í summar hava teir spælt ymsastaðni í Danmark, og framførslurnar halda fram í heyst. Bólkurin arbeiðir eisini við nýggjum sjónbandalagi, og roknað verður við, at onkur stakfløga afturat kemur av útgávuni hjá The Dreams. Eftir tað er ikki óhugsandi, at bólkurin eisini fer at søkja kjansin uttanfyri Danmark.

## Chief sær møguleikarnar

Maðurin, sum fram um øll onnur, hevur sæð møguleikarnar í The Dreams er framleiðarin Chief 1. Hann er ein royndur harri í donskum tónleiki, og hann hevur takkað nei til onnur tilboð fyri at kunna brúka orku upp á The Dreams.

- Eg havi gjørt tónleik meginpartin av mínum lívi. Eg livi av og fyri at gera tónleik, og eg leiti altíð ímóti tí, sum eg haldi verða spennandi. Í fjør var eg til eina tónleikakapping í Vega í Keypmannahavn, og tá hoyrdi eg fyrstu ferð The Dreams. Eg lurtaði eftir 23 bólkum tað kvøldið, men tað var bara ein bólkur, sum eg fekk meg á føtur og fram til pallin, og tað var The Dreams. Tá ið eg hoyrdi teir, hugsaði eg: Hvat tramin hendir her?

- Hetta var ein av teimum løtunum, sum eg livi fyri í tónleiki. Løturnar upplivir tú ikki so ofta, men tá ið eg geri tað, so eg eri glaður fyri, at eg ikki eri húsaseljari ella okkurt annað, men framvegis fáist við tónleik, sigur Chief 1.

## Góðir at samstarva við

Chief 1 er sera fegin um samstarvið, sum hann hevur havt við The Dreams.

- Eg valdi at samstarva við The Dreams, tí teir eru fantastiskir. Teir eru nakrir av teimum fittastu fólkunum, sum eg nakrantíð havi hitt, og teir eru serstakliga seriøsir. Teir venja sera miðvíst og ganga so høgt upp í tónleikin, at eg havi ikki upplivað nakað líknandi millum teir tónleikarnar, sum eg havi annars havi arbeitt saman við seinnu árini, sigur Chief 1.

- Eg havi hug at síggja tað potentiali